# Tvøst fyri nevndarsessir

**Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi kroysti danska Socialdemokratiska flokkin til at stuðla donsku stjórnini í tvøstmálinum á CITES fundinum. Avleiðingin av, at Danmark atkvøddi ímóti japanska uppskotinum, kundi verðið, at Socialdemokratarnir mistu nevndarsessir á Fólkatingi**

TVØSTMÁLIÐ
*Edvard Joensen*



*Mogens Lykketoft, formaður í Socialdemokratiska flokkinum, og Lars Emil Johansen, limur í Norðuratlantiska bólkinum á Fólkatingi, hava havt fund um tvøstmálið í Cites. Úrslitið varð, at Socialdemokraarnir nú taka undir við donsku stjórnini og áleggja donsku sendinevndini í Cites at atkvøða blankt, tá japanska uppskotið um sølu av stórhvalatvøsti kemur til atkvøðugreiðslu*

*Mynd: Símun J. Hansen*

Socialdemokratarnir á Fólkatingi hava broytt støðu í málinum um sølu av tvøsti. Eftir fund við umboð fyri Norðuratlantsbólkin fara teir ar mæla donsku sendinevndini á CITES fundinum til at atkvøða blankt, tá japanska uppskotið um sølu av stórhvalatvøsti kemur til viðgerðar.

Grundin til at Socialdemokratiki flokkurin á Fólkatingi hevur broytt sína støðu í hesum máli er, at um teir ikki gjørdu tað, kundi hugsast at Norðuratlantsbólkurin fór at brúka sína ávirka í valsamstarvinum á Fólkatingi soleiðis, at socialdemokratarnir ikki fingu teir nevndarsessir á tingi, sum teir annars kunnu fáa, sigur Høgni Hoydal, føroyskur fólkatingslimur.

Hann greiðir frá, at Norðuratlantsbólkurin er við í einum valteknisku bólki á Fólkatingi, sum er við til at býta nevndarsessir. Nú Fólkatingið kemur saman til nýggja setu, skulu hesir sessir aftur býtast. Í valbókinum er millum annað Socialdemokratiski flokkurin, og hann kann missa onkran nevndarsess, um norðuratlantisku atkvøðurnar knapplig mangla.

Hetta hevur grønlendski fólkatingsmaðurin, Lars Emil Johansen, gjørt Mogens Lykketoft, formanni í Socialdemokratiska flokkinum, greitt á fundi, sum Norðuratlantsbólurin bað um.

Socialdemokratarnir á Fólkatingi hava ringar royndir av tvørum norðuratlantiskum fólkatingslimum og hava neyvan gloymt tað, sum hendi, tá Jóannes Eidesgaard í síni tíð ikki atkvøddi fyri at velja Birte Weiss til formann á Fólkatingi.

Orsøkin til fundin millum Norðuratlantsbólkin og Socialdemokaratarnar er tann, at danska stjórnin ætlaði, at danska sendinevndin á fundinum hjá CITES skuldi atkvøða blankt, tá japanska uppskotið um at loyva sølu av stórhvalatvøsti kom til atkvøðugreiðslu.

Síðan er tað hent, at stjórnin hevur fingið boð frá Europanevndini á Fólkatingi, har millum annað SF og Socialdemokratarnir eisini eru við, um at atkvøða nei. Hóast hetta kann stríða móti bæði føroyskum og grønlendskum áhugamálum.

Men eftir fundin millum Lars Emil Johansen og Mogens Lykketoft hava Sosialdemokratanrir broytt støðu, soleiðis at meirilutin í Europanevndini nú er samdur við stjórnini, og boðini til stjórnina um at áleggja sendinevndini atkvøða ímóti japanska uppskotinum verða tikin aftur. Sostatt verður tað, sum stjórnin ætlaði. At danska sendinevndin fer at atkvøða blankt, sigur Høgni Hoydal, fólkatingsmaður og limur í Norðuratlantsbólkinum.

–Vit hava brúkt tey amboð, vit hava til taks. Og í hesum førinum sær tað út til at hava gjørt mun, sigur hann.

# Flogferðsla á internetinum

**Til ber nú at síggja á heimasíðuni hjá Statens Luftfartsvæsen í Føroyum, hvussu flogferðslna í Vágum er eina viku fram í tíðina**

FLOGERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Nú verður ikki neyðugt at ringja ella fara á flogvøllin fyri at fáa at vita, nær flogfarið lendir ella fer. Tað kann ein nú fáa at vita fyri eina viku í senn við at hyggja á heimasíðuna hjá Vága floghavn*

*Mynd: Edvard Joensen*

Nú ber til at fylgja flogferðsluni í Vágum um internetið. Statens Luftfartsvæsen hevur lagt ferðaætlnina hjá fogførunum á heimasíðuna. Eisini eru skermar settir upp í teminalinum, har víst verður, hvussu ferðslan er.

Til ber nú hjá fólki, sum sita við ein telduskíggja, at sláa upp á heimasíðuna www.slv.dk/vagar og síggja, nær flogfarið úr Reykjavík kemur í Vágar í næstu viku. Eisini flogfarið við fótbóltsáskoðarum úr Dublin ella vanliga rutuflogfarið úr Kastrup.

Vága Floghavn hevur í summar roundarkoyrt hesa skipanina, og nú verður hon hildin at virka so mikið væl, at hon verður løgd á heimasíðuna.

Men eisini á flogvøllinum sjálvum, í terminalinum, eru hesar tíðir nú atkomiligar fyri ein og hvønn, uttan at neyðug er at fara inn á skrivstovur ella til diskar at spyrja. Skermar eru settir upp, sum vísa, nær flogførini, merkt við rutunummarið, koma og fara. Júst sum fólk kenna tað aðrastðani frá.

Fyrr hevur hetta verið møguligt at sæð á einum lítlum skermi uttan fyri avgreiðsluskrivstovuna hjá Atlantsflogi. Tað vil siga, nær flogførini hjá Atlantsflogi koma og fara.

Nú ber eisini til at síggja eina viku forút, nær eitt fremmand leiguflogfar við eitt nú einum ísrealskum fótbóltslandsliði, lendir í Vágum.



Løgmaður:

# Vit ynskja sjálvstýri í ymiskari takt

**Løgmaður frøist um at føroyingar 'tykjast nærkast einari tjóðskaparligari semju' í sjálvstýrismálinum – samstundis sum spurningurin um ES grundlóg í Danmark kann gerast grundleggjandi**

RÍKISFELAGSSKAPUR
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Jóannes Eidesgaard løgmaður saman við Fólkatingsins formanni Christian Mejdahl, Fólkatings umboðnum Høgna Hoydal, og Løgtingsins formanni Edmund Joensen; orsakað av fundi bar tað ikki til hjá hinum føroyska Fólkatings umboðnum, Lisbeth Petersen, at vera við á myndini*

*Foto: Símun J. Hansen*

Jóannes Eidesgaard løgmaður hoyrdi undir setanini av Fólkatinginum týsdagin einki óvæntað í umrøðu danska forsætisráðharrans av Føroyum, Grønlandi og ríkisfelagsskapinum. Hinvegin staðfesti løgmaður at tað føroyska sjálvstýrismálið er í ferð við at verða »neutraliserað« sum stríðsmál, samstundis sum relatiónirnar millum Føroyar og Danmark hava verið undir »stabilisering« í seinastuni.

»Eg havi hoyrt nógvar stjórnar røður,« segði løgmaður aftan á fundin í Fólkatinginum. »Vanliga fyllir tann parturin av setanarrøðuni ið snýr seg um Føroyar, Grønland og ríkisfelagsskapin, ikki nógv. Og røðan hesuferð var einki undantak í so máta; forsætisráðharrin tók tað við sum hann átti at taka við, nevniliga tað um uttanríkismál og tað um yvirtøkulógina.«

Forsætisráðharrin segði millum annað í røðu sínari: »Ávirkan, ábyrgd og samstarv eru lyklaorð í nýmótans samstarvi, og hetta er hugburðurin hjá Stjórnini nú ríkisfelagsskapurin skal dagførast… Vit skulu halda fram við at endurnýggja og nútímansgera ríkisfelagsskapin (…).«

Vit spurdu løgmann: Segði Anders Fogh Rasmussen einki sum bendi á nakað nýtt?

»Tað veldst um hvussu tú vendir tí,« segði Jóannes Eidesgaard. »Hatta við at tað skal moderniserast og dagførast í ríkisfelagsskapinum er kanska meira at meta sum kryddarí enn beinleiðis ítøkiligt innihald. Hinvegin var tað hann segði eisini í tráð við tað sum Landsstýrið og Stjórnin eru á einum máli um. Hetta hevur ligið í kortunum og hann leveraði tað hann skuldi; hann ansaði eisini eftir at ikki trampa inn á innanhýsis føroysk mál.«

Stutt men sterkt

Løgmaður las samstundis størri týdningar í teir politisku veruleikarnar aftan fyri orð forsætisráðharrans, nevniliga tá talan er um uttanríkismál, yvirtøkur og sjálvstýrismálið. Sæð við hesum brillunum er talan um eina grundleggjandi tríeind sum bestendur av sínámillum samanhangandi spurningum: føroyingar fáa 'fullmakt' innan fyri karmarnar av tí donsku grundlógini og ríkisfelagsskapinum til at føra egnan uttanríkispolitikk; føroyingar fáa staðfesta heimild til at yvirtaka øll málsøkir sum kunnu yvirtakast við einari kjarnu av undantøkum sum beinleiðis er tengd at mørkum ríkisfelagsskapsins og grundlógarinnar; og tað er upp til føroyingar sjálvar um og nær teir vilja melda seg úr ríkisfelagsskapinum og samtykkja egna grundlóg.

»Tað sum útger kjarnan í okkara verandi formi fyri ríkisfelagsskap er nøkur fá men stór og týðandi mál,« segði løgmaður. »Hesi eru í stuttum uttanríkismál, verju- og trygdarmál, valutamál og ríkisborgaraskapur. Tað sum er í ferð við at henda realpolitiskt er at føroyingar og grønlendingar fáa fullmakt til at føra egnan uttanríkispolitikk og harafturat umboða Rikið úteftir í málum sum beinleiðis viðkoma okkum heldur enn dønum. Hetta merkir í praktikkinum at vit nú fáa fulla heimild til at samráðast við onnur lond um samstarvsavtalur, og vit kunnu samskifta beinleiðis við myndugleikar og sendistovur hjá øðrum londum; tó skulu vit boða dønum frá og so skjótt Danmark sjálvt er við í myndini koma avmarkingar inn. Í tann mun grønlendingar eisini eru við i myndini, noyðast føroyingar og grønlendingar at samráðast við felags støði, hvat ið kann vera óheppið viðhvørt. Men hetta eru tó stór framstig.«

Júst framstig á sjálvstýrisleið tykist ikki at liggja fjar fyri sitandi samgongu, hóast tann partapolitiska samansetingin traditionelt átti at bent á alt annað. Tann komandi yvirtøkulógin er sambært løgmann líka so sterk sum hon er stutt: hon nevnir fyrst sum undantøk tey kjarnumál ið beinleiðis verða tengd at markinum fyri ríkisfelagsskap og grundlóg, fyri síðani at staðfesta at alt annað kann yvirtakast uttan mun til um talan er um 'A' ella 'B' mál ella annað ið ikki er bólkað eftir hesum.

»Yvirtøkulógin er stutt men inniheldur nógv,« segði Jóannes Eidesgaard. »Hon setur avmarkingar í karmunum fyri ríkisfelagsskapin og donsku grundlógina men sigur síðani at alt annað kann yvirtakast sum føroysk sermál.«

## Semja um sjálvsstýri?

Tann konfrontatión sum ofta hevur verið millum føroyingar og danir í sjálvstýrismálinum er í ferð við at verða vend til nakað ið føroyingar sjálvir »róliga og sinniliga« kunnu taka støðu til og stýra, segði løgmaður.

»Tað sum nú hendir tá hesar nýggju lógir koma í gildi er at sjálvstýrismálið, meira enn nakrantíð, verður ein søk burturav fyri Føroya Løgting at taka støðu til. Hetta er eisini í tráð við tann politiska konsensus sum finnist í Fólkatinginum og í stjórnini, nevniliga at sjálvstýrismálið er upp til føroyingar. Her hevur man neutraliserað nakað sum leingi hevur verið eitt stríðsmál… Gjøgnum stabilisering í viðurskiftunum millum okkum og danir verður forðað fyri samanbresti millum partarnar. Í stuttum er sjálvstýrismálið gjørt til eitt føroyskt mál burturav, og tað haldi eg er sunt fyri hetta málið… Vit tykjast nærkast einari tjóðskaparigari semju um málið, og hetta er uttan iva nakað sum føroyingar sjálvir róliga og sinniliga koma at loysa, í tí takt sum hóskar til egnar búskaparligar og fíggjarligar fyritreyir.«

Eru allir dagsins politisku flokkar í Føroyum í veruleikanum sjálvstýrisflokkar?

»Mangt bendir á at vit eru komin fram til tað stig at vit draga somu línu í málinum um sjálvbjargni og sjálvstýri… Teir politisku flokkarnir flyta seg so við og við, og eg dugi at síggja at nógv er broytt tey seinastu árini. Ídag eru allir flokkar her í høvuðsheitum samdir um kósina, hóast ymiskar meiningar eru um ferðina.«

»Hugsa bara um eitt mál sum yvirtøkan av Fólkakirkjuni. Kirkjan hevur jú ein sera stóran leiklut í okkara samfelag… Tann semja føroyingar nú eru komnir fram til í hesum máli tóktist óhugsandi fyri nøkrum árum síðani.«

## Varin við ES grýtu

Undantøkini fyri yvirtøkur og føroysk sermál, sum nú koma at standa eftir millum varðveittan ríkisfelagsskap og fulla loysing, minna í ironiskan mun um tey 'fýra fyrivarnini' sum danir enn halda fast um í mun til Europeiska Samveldið. Tað verður tosað nógv um eina komandi ES grundlóg og eina vaksandi miðsavnan í Bruxelles av týðandi pørtum av tí politiska valdinum hjá ES londunum - og hvønn týdning hetta fær fyri Føroyar, nevniliga um myndugleikin í málum sum danir umsita vegna ríkisfelagsskapin fer at falla undir ES.

Hóast Høgni Hoydal, fólkatingslimur og formaður Tjóðveldisfloksins, festi seg við at Anders Fogh Rasmussen í sínari setanarrøðu ikki nevndi Føroyar og Grønland við einum orði í sambandi við tað hann segði um eina komandi ES grundlóg, so helt løgmaður ikki at forsætisráðharrin gjørdi skeivt í hesum.

»Anders Fogh Rasmussen vildi vísa virðing fyri at Løgtingið í 1974 samtykti at Føroyar skuldu haldast uttan fyri EF,« segði Jóannes Eidesgaard. »Hann vildi samstundis vera varin og lata vera við at røra óneyðugt í einari grýtu sum leingi hevur goymt upp á eitt fullkomið tabu í Føroyum. Men evnið er ikki minni týðandi fyri tí… ES grundlógin má enn sigast at vera meira retorikkur enn realitetur, men vit hava eina delikata støðu her - serliga um, ella tá, tey donsku fyrivarnini verða slept. Hetta evnið varð eisini umrøtt á ríkisfundi herfyri og semja var um at gera kanningar av teimum avleiðingum fyri rikisfelagsskapin ið kunnu hugsast í hesum sambandi. Vit vilja sjálvandi vita hvat hendir um ella tá málsøkir verða flutt til ES.«

## Nýggj heimastýrislóg?

Høgni Hoydal helt at Føroyar og Grønland vórðu raðfest nakað niðarliga í setanarrøðuni hjá Anders Fogh Rasmussen. Hann helt seg ikki annars ikki hoyra nakað nýtt, samstundis sum hann viðgekk at tað kann vera ringt at siga hvat sum kann liggja í tí sum varð sagt. Men hann mælti til at standa á varðhaldi móti donskum »sminki« og øðrum snildum ið kunnu hava til endamáls at »parkera tilgongdina« móti føroyskum sjálvræði.

»Eitt er tey føgru orðini um føroyskt sjálvræði og nýggja yvirtøkulóg,« segði Høgni Hoydal. »Nakað annað er hvat trúvirði liggur í orðunum. Royndirnar vísa okkum at danir vilja ganga langt fyri at varðveita okkum í ríkisfelagsskapinum, ofta við sminki sum skal dylja veruleikan; teirra útspæl kann í ringasta føri lokka okkum í eina fellu sum læsir Føroyar fastar í innibyrging, gjøgnum eina nútímansgjørda heimastýrislóg.«

»Danir hava fyrr roynt at parkera tilgongdina sum vit hava havt móti fullveldi og teir vilja kanska framvegis royna tað. Teir hava forðað okkum umboðan í IWC, teir hava forðað okkum í at gerast sjálvstøðugir limir í Norðurlandaráðnum, og teir hava mótarbeitt okkum í fleiri øðrum mótsvarandi málum. Tað ljóðar mikið gott við semjum og sjálvræði og øllum tí, men hvat liggur í tí? Eg vil ikki gita ov nógv nú, áðrenn eg havi sæð tekstin í tí sum er upp á tal.«